## Venjarin biður um hjálp

Tað er ivasamt um gamla felagið hjá Julian Johnsson, Kongsvinger, sleppur at halda fram í bestu norsku deildini næsta ár. Felagið hevur fíggjarligar trupulleikar. Nú biður venjarin Tom Nordie fólk um hjálp at bjarga felagnum. Hann hevur sent sms-boð runt, har hann heitir á viðhaldsfólkini um bakka upp um felagið og hjálpa felagnum fíggjarliga.



## Galatasaray vil hava niðurlendingar

Frank Rijkaard er nýggjur venjari í turkiska stórfelagnum Galatasaray, og stendur tað til Rijkaard, so verður hann ikki einsamallur niðurlendingur í felagnum. Ein turkiskt blað vil vera við, at Rijkaard ætlar sær at fáa Klaas-Jan Huntelaar, John Heitinga og Ryan Babel til Galatasaray at spæla. Allir tríggir eru niðurlendingar og verða helst seldir í summar.

# Troyttur men glaður

**Aftaná skurðviðgerð og drúgva sjúkra-fráveru var Vagnur Mohr Mortensen aftur at síggja á besta liðnum hjá HB ígjár**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Øll HB-viðhaldsfólk fegnast um 3-2 sigurin á Víkingi, og ta greiðu oddastøðuna hjá HB. Men tað sum HB-viðhaldsfólk, spælarar og leiðarar frøddust mest um ígjár, var at síggja ein gamlan kenning aftur á liðnum hjá HB. Fyrrverandi landsliðsspælarin, Vagnur Mohr Mortensen var aftur at síggja í HB-verjuni – har hann áður hevur tikið mangt takið - í 3-2 sigrinum hjá HB á Víkingi á vøllinum í Sarpugerði í Norðragøtu ígjár.

Tað var ein sjónliga fegin Vagnur Mohr Mortensen, sum vitjaði 3. Hálvleik hjá Rás2 í bowlinghøllini á Hálsi ígjár.

– Eg var øðiliga troyttur, tað er langt síðani eg havi kent meg so troyttan. Eg byrjaði at fáa krampa í tjúkkunum ímóti dystarenda, men tá ein vinnur ein slíkan dyst 3-2, so kann ein bara vera glaður, tá dysturin er liðugur.

### Fekk boðini hóskvøldið

Vagnur kom aftur úr Danmark týsdagin, og hevur hann nú fingið grønt ljós til eitt aktivt lív aftur, aftaná eina húðkrabbaskurðviðgerð og eina rættiliga drúgva sjúkrafráveru.

– Tá vit vandu hósdagin, fekk eg at vita, at eg skuldi byrja inni ímóti Víkingi, greiðir Vagnur frá.

– Eg fekk at vita í Danmark, at alt sá gott út, og tað var veruliga deiligt, ein sannur lætti.

Spurdur um hann koma aftur á tað sama góða støði sum fótbóltsspælari svarar Vagnur:

- Ja tað er eingin trupulleiki, eg fekk onga strálu-viðgerðir og kemiviðgerðir. Eg havi nakrar skurðar á kroppinum, men annars eru eingir trupuleikar.

Spurdur um hvussu hann hevur hildið seg í gongd, síðani skurðviðgerðina, svarar Vagnur:

- Eg eri lættur, og havi ikki lagt meg út, so tað gingu bert nakrar vikur, so var eg í góðum formi aftur.

Longst at sleppa inn

Vagnur hevur verið sera spentur, sum hann hevur eygleitt sínar liðfelagar frá síðulinjuni, tað sum farið er av kappingini í vodafone-deildini higartil.

– Serliga tá tað hevur gingið so væl, sum tað hevur gjørt ta seinastu tíðina, so vil ein bara sleppa uppá liðið aftur. Tað er altíð keðiligt at sita uttanfyri.

Vagnur heldur, at HB hevur ein góðan og sterkan hóp, sum er, og tí verður tað ikki neyðugt hjá leiðsluni í HB at fara út og styrkja um hópin.

– Har eru nógvir góðir, ungir spælarar á veg, so eg haldi ikki vit hava brúk fyri nøkrum styrki uttanifrá til hópin hjá okkum, slær Vagnur fast.

### Væntar trý stig hóskvøldið

Hóskvøldið stendur lokaluppgerð ímóti B36 á skránni, og hóast HB hevur duppult so nógv stig, sum grannarnir úr B36, so staðfestir Vagnur, at talan er um eina lokaluppgerð: -

Í einari lokaluppgerð kann alt henda, men vit fara sjálvsagt eftir trimum stigum, og eg verið sera vónbrotin, um vit ikki fáa trý stig hóskvøldið.

Spurdur um hvat lutakast hann kundi hugsað sær til innleiðandi umfarið í Europa League, svarar Vagnur:

- Tað hevði kanska verið fínt at sloppið ein túr til Íslands, tí tá hevði mótstøðan ikki verið so ovurstór, men tað hevði eisini verið í lagi at farið ein túr eystureftir.




*Eftir at hava verið undir skurð fyri húðkrabba, var Vagnur Mohr Mortensen fyri fyrstu ferð aftur á besta HB-liðnum, tá oddaliðið í gjár vann topp-uppgerðina móti Víkingi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Bestubitar úr triðja hálvleiki

***Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, á Rás2 eru SMS'boð frá lurtarum, sum geva sína meining til kennar um dagsins umfar. Besta SMS'ið hesa ferð vann eitt kartong av Lion Bar ísum, og er hetta SMS'ið prentað ovast í røðini***

***»Sigi sum onkur,koyr teir sum brennað straffið ì hvìta posa,Tað sum brennir.:->«***

***»Spælid hjà frensunum er ein KATTAstrofa«***

***»Víkingar hoyra heima í einum savni ì vestmanna og HB koyr tad heim koyr tad heim hb hb hb«***

***»Avaring til allar nordoyingar! Bla hitabylgja avegis«***

***»Ta HB i 2001 la nummar 8, tosadu nogv um seven up. Men hævnen er sød. Nu kunnu vit eru 8 stig frammanfyri nummar 2, kunnu vit bjoda hinum after eight«***

***»Vespurnar fingu streym«***

***»B36 meldast fyri tjovari?! So skuldi 07 Vestur næstan verid meldad fyri eldaseting, so nogv teir brendu«***

***»Eg veit ikki hvat er hent, øll fløgg a fullari stong ì Klaksvk.... ??«***

***»Ki pissadi uppa frensarnar«***

***»KI leikarar gleda seg til Summarfestivalin. Nú kunnu teir syngja You Win Again saman vid Robin Gibb«***